tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 117 Friggjadagur 21. juni 1996 70. árgangur Krónur 7,00

## Fakfeløg um skatta-lyftini:





# Ikki talingur um lønar-niðurskurð

*Samgonguskjalið leggur upp til at fakfeløgini skulu ganga við til lønarlækking afturfyri skattalætta, men hetta taka fakfeløgini ikki væl ímóti*

síða 4

## Plástur á nøsina:

## Betrar um anda-dráttin



*Nýggjasta dillan innan fótbóltsheimin er plástur á spillfrískar nøsar*

síða 15

## Her er boripallurin sum skal bora í Lopra:



# Byrjar í juli

*Boripallurin kemur til Vágs 3. juli og verður alt fyri eitt settur upp í Lopra. Byrjað verður at bora 6. juli*

síða 7

VIT KOYRA ALT SLAG AV
VØRUKOYRING
FLYTING ÚR FØROYUM TIL FØROYA
VIT HAVA FLYTIKASSAR, GOYMSLU OG KAPPINGARFØRAR PRÍSIR
TILBOÐ VERÐA GIVIN
O.A. VØRU-KOYRING
17727 · 88727

Ford
STÓRUR BRÚKTBILAMARKNAÐUR
Leygardagin 22. juni
frá kl. 10–15
P/F WENZEL
Akranesgøta 5 Havn Tlf. 13873



- Tá ið vit eru liðnir, pakka vit saman, antin vit eru komnir ígjøgnum ella ikki, sigur Arne Rosenkrands Larsen, sum her er avmyndaður á útferð í Famjin

# Gongur væl í Lopra

ÁKI BERTHOLDSEN

Arbeiðið at gera boriplássið í Lopra klárt at bora á, gongur sum ætlað.

Arne Rosenkrands Larsen í Danop sigur, at fyribils gongur sum ætlað og hann roknar við at kunna byrja at bora miðskeiðis í juli.

Boringin varar í einar tveir mánaðir.

Borholið í Lopra er longu 2100 metrar og ætlanin er at bora 1500 metrar afturat, niður á 3600 metrar.

Ein stórur spurningur í sambandi við boringina hevur verið um tað verður nóg mikið til at koma ígjøgnum basaltið so greiða fæst á, hvat er undir basaltinum.

- Sjálvandi hevði tað verið betri at komið ígjøgnum basaltið.

- Men koma vit ikki tað, gerst ikki við. Tá ið vit eru liðnir, rigga vit av, sigur Arne Rosenkrands Larsen.

Hann sigur, at tá ið teir 1500 metrarnir eru boraðir, eru pengarnir uppi, og so verður riggað av.

- Hetta er eitt púra greið ætlan. Karmarnir í avtaluni eru greitt settir upp og tá ið pengarnir eru brúktir, rigga vit av.

Hann sigur, at boringin er ikki misreydnað, hóast teir ikki koma ígjøgnum basaltfláirnar.

- Vit fara í øllum førum at fáa nógv fleiri upplýsingar um føroysku undirgrundina, enn vit høvdu frammanundan. Á tí grundarlagnum verða vit vónandi betri før fyri at meta um aðrar upplýsingar, vit hava um undirgrundina.

- Men tað er greitt, at vit vóna at koma ígjøgnum basaltfláirnar, tí tá verða upplýsingarnar uppaftur betri.

- Arne Rosenkrands sigur, at teir hava ábendingar um, at teir koma ígjøgnum basaltið.

Men øll feløgini, sum eru við í ætlanini, eru fult greið yvir, at tað kann henda, at vit ikki koma ígjøgnum.

- Tað er tað, feløgini vága við ætlanini.

Hann sigur, at hevur onkur hug at halda fram, um teir ikki koma ígjøgnum hesuferð, má viðkomandi sjálvur fíggja arbeiðið.

- Eg vænti ikki, at vit koma víðari, sigur hann.

*Leif Larsen, stjóri í Geco Prakla í Noregi:*

# Vónsvikin at so fáir føroyingar lúka krøv

*Tilsamans 28 føroyingar søktu størvini, sum stóra seismiska fyritøkan Geco-Prakla lýsti leys í føroyskum bløðum herfyri. Men bert 2 ella 3 lúka krøvini, sum fyritøkan setir til fólkið, ið skal manna skipini hjá felagnum*

Jan Muller

Leif Larsen, leiðari av sjómannadeildini hjá Geco-Prakla fyritøkuni í Stavanger dylur ikki fyri, at hann er ikki sørt vónsvikin og samtíðis rættiliga kløkkur av, at so fáir føroyingar við røttu útbúgvingini og royndunum hava søkt tey mongu størvini umborð á skipunum hjá fyritøkuni, sum herfyri vórðu lýst leys í Føroyum.

Eg eri sera fegin um at fáa heilar 28 umsóknir til størvini vit lýstu leys, men tíanverri eru har bert einir 2-3 umsøkjarar, sum eru sera væl kvalifiseraðir til størvini. Nú verður so tosað við hesar og helst eisini nakrar aðrar av umsøkjarunum.

Ætlanin var annars at seta einar 15 føroyingar at arbeiða umborð á seismikkskipunum hjá fyritøkuni, sum arbeiða kring alla verðina og nú eisini í føroyskum øki.

Møguliga kundi hetta talið verða enntá hægri seinni, kanska upp í eini 25 fólk.

Geco Prakla, sum í løtuni ger seismiskar kanningar við skipinum Geco My á føroyskum øki fyri AMG-samtakið, hevði fyri góðum mánað síðani lýsing í m.a. Sosialinum, har søkt varð eftir fólki til at arbeiða sum maskinfólk, stýrimenn, teldufólk o.a. umborð.

Her varð so eisini hugsað um fólk við útbúgving sum eitt nú verkfrøðingar.



*Leif Larsen er sera vónsvikin av, at so fáir føroyingar við útbúgving og royndum søktu størvini umborð á seismisku skipum teirra.*

Leif Larsen sigur, at tað er vanligt, tá teir byrja at arbeiða í nýggjum økjum í heiminum, at teir so royna at fáa fólk frá landinum, har teir arbeiða, við skipunum.

- Vit høvdu roknað við fleiri kvalifiseraðum umsøkjarum. Men tað er kanska tí, at teir longu hava arbeiði, at so fá við røttu útbúgvingini og bakgrundini hava søkt størvini, sigur Leif Larsen, sum tó vónar, at okkurt betur fer at spyrjast burtur úr seinni.

- Vit eru bert júst byrjaðir at arbeiða í føroyskum øki, so vónandi verða her fleiri uppgávur í framtíðini og tá eisini fleiri føroyingar til at manna skip okkara, sigur Leif Larsen.

Tað hevur annars gingið væl hjá Geco My, sum ger seismiskar kanningar fyri AMG-oljusamtakið. Teir hava verið nakað órógvaðir av veðri, men sum heild hevur gingið væl.

Geco My kemur inn á Miðvág mikudagin at skifta fólk. Hetta verður fyrstu ferð at eitt tílíkt skip kemur í Havn í Vágoynni.

*Geco My, sum ger seismiskar kanningar undir Føroyum*





*Boripallurin, sum kemur til Føroya í næstum, er 13 ára gamal. Hann er áður nýttur í Norðsjónum. Hann er í góðum standi verður sagt.*

*Boringin í Lopra byrjar 6. juli:*

# Maersk riggar til at koma til Føroya

***Boripallurin kemur til Vágs 3. juli og verður alt fyri eitt settur upp í Lopra. Ætlanin er at tendra fyri borinum leygardagin 6. juli og verður tá borað alt samdøgrið uttan íhald í í hálvan annan mánað. Fýra føroyingar eru í løtuni umborð á boripallinum Maersk Endever, har teir kunna seg við boriarbeiðið. Hetta er so fyrsta royndin at læra upp føroyingar til framtíðar boriuppgávur í Føroyum.***

*Umboðini fyri Føroya Verkfrøðingafelag, sum herfyri á vitjan í Aberdeen nýttu høvi til at síggja boriútgerðina hjá Maersk Contractors, ið skal brúkast í Lopra*



Jan Muller

Fólk hjá Maersk Contractors í Aberdeen fara mánadagin undir at taka "Rig 81", sum hann verður nevndur, sundur og gera klárt at senda hann til Føroya.

Torben Korsgaard, operatiónsstjóri hjá felagnum sigur við Sosialin, at boriútgerðin fer til Føroya við Smyrli 1. juli og verður løgd upp við síðuna av flakavirkinum í Vági 3. juli. Haðani verður øll útgerðin so flutt til Lopra, har tendrað verður fyri borinum leygardagin 6. juli.

Síðani gongur tað slag í slag, alt samdøgrið í tilsamans 42 samdøgur.

Boriútgerðin kann bora niður á 3600 metrar. Verandi boriholið er umleið 2200 metrar, so talan verður í veruleikanum bert um at bora teir umleið 1400 metrarnar afturat.

Torben Korsgaard hevur arbeitt sum bæði operatiónsstjóri og boripallstjóri hjá Maersk kring alla verðina, og hóast talan sum so ikki er um nakra kollveltandi ella øðrvísi boring í Lopra, so er hann ómetaliga spentur at sleppa í gongd júst í Føroyum.

-Hetta er jú eitt heilt nýtt øki, so tað er sjálvandi spennandi at vera við frá byrjan, tá borað verður. Eg vóni eisini, at vit koma at vera við í øðrum líknandi arbeiðum í framtíðini sigur hann.

Uppá fyrispurning hvat hendir um teir ikki koma niður gjøgnum basaltfláirnar, tá teir eru komnir niður á 3600 metrar, sigur Torben Korsgaard, at ein sjálvandi má vóna, at teir koma gjøgnum basaltið fyrr enn tað. Men um ikki so er tað ikki ein spurningur, sum Maersk skal taka støðu til. Tá er tað operatørurin Danop.

Annars hava serfrøðingar víst á, at bert 200 metrar longur niðri enn borað varð í 1981 hendir ein ella onnur broyting í løgunum, sum kann týða uppá, at basaltið endar har. Men tað er sjálvandi ikki víst, og tí skulu borast 1400 metrar afturat.

**Fýra føroyingar við**

Maersk Contractors fer at brúka eini 12 til 14 fólk í boriarbeiðinum. Av teimum eru fýra ungir og raskir føroyingar.

Tá umboð fyri Maersk vóru í Føroyum herfyri fekst í lag eitt samstarv við Skipasmiðjuna í Vági, sum síðani hevur víst teimum á fýra ungar føroyingar millum 19 og 26 ár, ið vóru áhugaðir í at læra seg upp í boriarbeiði.

Hesir fýra hava síðani verið á boriskeiði hjá Maersk Contractors í Danmark og eru teir í løtuni úti á boripallinum Maersk Endever í Norðsjónum at fáa fleiri royndir. Teir koma til Føroya í næstum at vera við í arbeiðinum.

Tobern Korsgaard sigur seg vera sera væl nøgdan við teir fýra føroyingarnar, sum hann vónar fara at síggja boripallin og greitt varð frá honum og hvussu hann arbeiðir. Hetta var áhugavert og vónandi fer halda fram í hesum arbeiðinum, nú tað helst verður farið at borað meira í føroyskum øki í framtíðini. Annars arbeiða fleiri føroyingar sum er hjá Maersk Contractors við nettup boriuppgávum.

Torben Korsgaard er annars sera væl nøgdur við samarbeiði við skipasmiðjuna í Vági, sum teir eisini hava gjørt avtalu við skal verða partur av tænastuveiting teirra.

Herfyri vóru umboð fyri føroyskt vinnulív á vitjan í Esbjerg, har høvi varð at síggja virksemi hjá Maersk. Tann vitjanin kann so eisini vera við til at knýta bond millum føroyingar og Maersk.

Torben Korsgaard vónar, at boringin í Lopra fer at ganga væl og at hon kann vera við til at knýta eitt gott samstarv millum føroyingar og Maersk Contractors.

-Tað eru nú 15 ár síðani, at íslendingar boraðu í Lopra. Tá var eydnan ikki við tykkum. Nú borað verður djúpri kunnu vit so bert vóna, at okkurt gott fer at spyrjast burtur úr sigur Torben Korsgaard, sum fer at vera h jastæddur undir boringini tó ikki alla tíðina.

Herfyri vitjaðu annars umboð fyri Føroya Verkfrøðingafelag í Aberdeen fyri at kunna seg við møguleikarnar hjá verkfrøðingum at fáa arbeiði í oljuvinnuni har.

Í hesum sambandi varð eisini vitjað á plássinum, har boripallurin hjá Maersk stendur. -Vit fingu høvi at okkurt gott at spyrjast burtur úr, tá pallurin kemur til Føroya sigur Símun Hammer, sum var við í ferðalagnum.

Teir nýttu so eisini høvi til at tosa við Graham Stewart, h álvur føroyingar og í høgum starvi hjá ráðgevarafyritøkuni PSL.

Eisini prátaðu teir við Alan Stokes, sum ser stjóri í ráðgevandi fyritøkuni MAI Consultants, sum í løtuni ger eina kanning fyri føroyskar myndugleikar, ið snýr seg um, hvar bestu møguleikar eru fyri útgerðarhavnum til oljuvinnu í Føroyum. Tað er oljufyrisitingin, sum hevur bílagt kanningina.



*Teir royndarkoyra borin í Aberdeen*